# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í ein strúk av útsynningi og ælingur fyrrapartin, men seinni lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Sunnudagin frískar hann vindin av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

## Prentmiðstøðin hjá Dimmalætting og Sosialinum verður í hesum døgum útbygd. Hetta hevur við sær, at bløðini hava verið munandi skerd í síðutali seinastu vikurnar

**PRENT**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er partvís fyri at endurnýggja maskinurnar og partvís fyri at kunna prenta fleiri síður í litum, at Prentmiðstøðin byggir út.

Prentmiðstøðin varð stovnað í 2000. Tá løgdu Sosialurin og Dimmalætting prentsmiðjurnar saman. Prentmiðstøðin leigar prenthøllini hjá Dimmalætting. Tá Prentmiðstøðin byrjaði, vórðu tær bestu maskinurnar hjá Sosialinum, sum hevði prentsmiðju á Argjum, og tær bestu hjá Dimmalætting settar saman.

Seinni eru fleiri útbyggingar gjørdar. Higartil hevur Prentmiðstøðin kunnað prentað bløð upp til 56 síður, harav 24 kunnu vera í liti. Tá útbyggingin er liðug, ber til at prenta 32 síður í litum, meðan síðutalið verður skert til 48 síður.



*Eyðun Húsgarð er stjóri á Prentmiðstøðini. Væntandi verður útbyggingini liðug fyrstu viku í mai*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Útbygging skerjir bløðini

Hetta fer kortini ikki at merkja, at bløðini tódna, tí við hesi útbyggingini verður eisini sett upp ein íleggingarmaskina, sum kann leggja bløðini saman, soleiðis at blaðið við tveimum koyringum kann prentast í 96 síðum.

Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini, sigur, at tey rokna við at kunna prenta bløðini í við eitt sindur fleiri síðum seinni í vikuni, og hann sigur, at tað eisini fer at bera til at prenta vikuskiftisíleggini hjá Sosialurin og Dimmalætting.

Vætnandi verður Prentmiðstøðin liðugt útbygd fyrstu viku í maimánaði.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | - |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 12 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | -- |
| La Paz | 5 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 980 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰ – 14/04 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰ – 14/04 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 16. apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 17. apríl | Seinna kvarter |
| 25. apríl | Tendring |
| 28. apríl | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. apríl | 04:36 | 16:55 | 03:36 | 15:55 | 03:51 | 16:10 | 06:36 | 18:55 | 07:36 | 19:55 | 02:51 | 15:10 | 01:51 | 14:10 | 04:51 | 17:10 | 05:51 | 18:10 | 04:21 | 16:40 | 05:36 | 17:55 |
| 22. apríl | 05:14 | 17:34 | 04:14 | 16:34 | 04:29 | 16:49 | 07:14 | 19:34 | 08:14 | 20:34 | 03:29 | 15:49 | 02:29 | 14:49 | 05:29 | 17:49 | 06:29 | 18:49 | 04:59 | 17:19 | 06:14 | 18:34 |
| 23. apríl | 05:53 | 18:14 | 04:53 | 17:14 | 05:08 | 17:29 | 07:53 | 20:14 | 08:53 | 21:14 | 04:08 | 16:29 | 03:08 | 15:29 | 06:08 | 18:29 | 07:08 | 19:29 | 05:38 | 17:59 | 06:53 | 19:14 |
| 24. apríl | 06:34 | 18:57 | 05:34 | 17:57 | 05:49 | 18:12 | 08:34 | 20:57 | 09:34 | 21:57 | 04:49 | 17:12 | 03:49 | 16:12 | 06:49 | 19:12 | 07:49 | 20:12 | 06:19 | 18:42 | 07:34 | 19:57 |
| 25. apríl | 07:18 | 19:44 | 06:18 | 18:44 | 06:33 | 18:59 | 09:18 | 21:44 | 10:18 | 22:44 | 05:33 | 17:59 | 04:33 | 16:59 | 07:33 | 19:59 | 08:33 | 20:59 | 07:03 | 19:29 | 08:18 | 20:44 |